MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Rundskriv

# um

# meginreglur fyri skúlastýri

Við heimild í § 57, stk. 3 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, hevur landsstýrismaðurin fyrisett hesar meginreglur um skúlastýri:

**§ 1.** Í seinasta lagi eina viku eftir at skúlastýrið er mannað boðar skúlaleiðarin til skipandi fund, har stýrið skipar seg við formanni, næstformanni og skrivara.
*Stk. 2.* Kommunustýrisumboðini verða vald á fundinum, har nývalda kommunustýrið skipar seg.

**§ 2.** Skúlastýrisfundirnir eru ikki almennir.
*Stk. 2.* Skúlastýrið kann heita á fólk um at taka lut á fundum fyri at lýsa serligar spurningar.
*Stk. 3.* Skúlastýrislimir hava tagnarskyldu.

**§ 3.** Hevur skúlastýrislimur forfall, eigur tiltakslimurin at fáa fundarboð.

**§ 4.** Skúlastýrið heldur fund, tá ið formaðurin heldur tað verða neyðugt, ella tá ið 2 limir í stórum skúlum sbrt. § 50, stk. 2 í fólkaskúlalógini, og 1 limur í smáum skúlum sbrt. § 50, stk. 3 í fólkaskúlalógini biðja um fund við ásettari dagsskrá. Tó skulu í minsta lagi 6 fundir vera árliga.
*Stk. 2.* Formaðurin ásetur tíð og stað fyri fundirnar.

**§ 5.** Formaðurin boðar til fundar við í minsta lagi 10 daga freist.
*Stk. 2.* Formaðurin ger í samráð við skúlaleiðaran dagsskránna og sendir hana til skúlastýrislimirnar í seinasta lagi 3 dagar undan fundinum. Skúlastýrislimur, sum ynskir mál á skránna, skal boða formanninum frá hesum í seinasta lagi eina viku fyri fundin.
*Stk. 3.* Í serligum føri kann formaðurin boða til fundar við styttri freist enn 10 dagar. Formaðurin skal tá kunna skúlastýrislimirnar um skránna.
*Stk. 4.* Dagsskráin fyri skúlastýrisfundir eigur at verða kunngjørd í skúlanum saman við møguligum fylgiskjølum.
*Stk. 5.* Mál, sum krevja tagnarskyldu, skulu verða tikin av skránni, áðrenn hon verður lýst.

**§ 6.** Skúlastýrið er viðtøkuført, tá ið meira enn helvtin av skúlastýrislimunum við atkvøðurætti eru á fundi.
*Stk. 2.* Skúlastýrislimir kunnu bara taka avgerð í einum máli, um teir eru á fundi.

**§ 7.** Fyri at skúlastýrið kann taka avgerð í einum máli krevst, at minst helvtin av skúlastýrislimunum atkvøða fyri.

*Stk. 2.* Stendur atkvøðugreiðslan á jøvnum, er formansins atkvøða avgerandi.

**§ 8.** Allar avgerðir verða førdar í gerðabók. Møttu skúlastýrislimirnir skulu skriva undir gerðabókina á næsta fundi.
*Stk. 2.* Minnilutar hava rætt til at fáa sína hugsan førda í gerðabókina og senda við málinum.
*Stk. 3.* Avrit av gerðabókini skal við teimum avmarkingum, sum tagnarskyldan hevur við sær, leggjast fram í skúlanum.

**§ 9.** Skúlastýrið ger ársfrágreiðing og sendir foreldrunum hana.
*Stk. 2.* Skúlastýrið boðar foreldrunum til fundar, har virksemi skúlans og ársfrágreiðingin verða umrødd.
*Stk. 3.* Skúlastýrið boðar lærarum og samstarvsfólki skúlans til fundar í minsta lagi eina ferð um árið. Á fundinum verður virksemi skúlans umrøtt.

**§ 10.** Um so er, at fleiri skúlar eru í einari kommunu, kann kommunustýrið skipa fyri ráðleggingar- og kunningarfundum fyri skúlastýrum, skúlastýrisformonnum og skúlaleiðarum til tess at stimbra og menna skúlaskapin í økinum.
*Stk. 2.* Kommunustýrið kann í samráð við skúlastýrini skipa fyri, at næmingar verða býttir millum skúlarnar í kommununi í sambandi við felags innskriving.

**§ 11.** Skúlastýrið kann umframt galdandi reglur eisini gera sína egnu fundarskipan.

**§ 12.** Hetta rundskriv fær gildi 1. jan. 2017. Samstundis fer úr gildi rundskriv um meginreglur fyri skúlastýrið frá 4. okt. 2012.

Mentamálaráðið, 30. september 2016

Jenny Lydersen
*undirvísingaleiðari*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • +298 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo